## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Hátíðarhald í Skúlanum í Kongagøtu



*Fríggjadagin 27. mai var hátíðarhald í nýggja Skúlanum í Kongagøtu í Havn í samband við at hesin varð tikin í brúk*

**Fríggjadagin 27. mai var hátíðarhald í nýggja Skúlanum í Kongagøtu í Havn í samband við at hesin varð tikin í brúk. Skúlin er bygdur á økinum har Tórshavnar Kommunuskúli og gamli realskúlin eru**



*Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, og fyrrverandi borgarstjórin í Tórshavan kommunu, Jan Christiansen*

MÓTTØKA

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, beyð øllum gestunum vælkomnum og handaði skúlastjóranum Hanusi Joensen eitt klaver sum gávu frá Tórshavnar býráð til skúlan.

Formaðurin í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, Hildur Eyðunsdóttir, landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, og skúlastjórin Hanus Joensen hildu talu.

Nógvur sangur og tónleikur á skránni, t.d. spældi Bjarni Lisberg klaver, ein trompet duett við Heina Andreasen og Hugin Reistrup, skúlaharmoniorkestrið, sum Andrea Heindriksdóttir stjórnaði, eisini luttóku bæði lærarar og børn undir leiðslu av Knúti Olsen. Til seinast skipaði 6c í Tórshavnar Komunuskúla fyri føroyskum dansi. Síðan varð høvi at síggja skúlan og njóta eitthvørt.



*Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, handaði skúlastjóranum Hanusi Joensen eitt klaver sum gávu frá Tórshavnar býráð til skúlan*



*Barnakór syngur undir leiðslu av Knút Olsen*



*Skúlin í Kongagøtu er bygdur á økinum har Tórshavnar Kommunuskúli og gamli realskúlin eru*

*Móttøka*




Í samband við at okkara trúgvi og góði starvsfelagi Hans Mortensen hevur 50 ára starvsdag, verður móttøka á bilasøluni hjá P/F Wenzel við Velbastaðvegin mikudagin 1. juni frá kl. 14.00 til 18.00

Hans byrjaði at arbeiða hjá okkum 1. juni 1955 og hevur sostatt verið her í 50 ár.
Vit takka Hans fyri tað góða og ábyrgdarfulla arbeiðið hann hevur framt og fremur í verki fyri P/F Wenzel.

*Vit ynskja Hans við familju, blíðan byr framyvir.*

Ford

**P/f Wenzel** Tlf. 354500 · www.wenzel.fo

Sosialurin 341800